

# Posta Stamps
## Føroyar

Nr. 20
April 2014

ISSN 1603-0036

- Heindrikur prinsur 80 ár
- Fyrri heimsbardagi
- Casement frágreiðingin og Dollin
- 70 ár síðan D-dagin
- Jólaevangeliið 2
- Postgjaldsmerki 2014: Føroysk frímerki í 40 ár

Posta
FAROE ISLANDS







FO 791 Royndarprent

# Heindrikur prinsur 80

Í samband við at Heindrikur prinsur av Danmark fyllir 80 tann 11. juni, geva Post Danmark, Post Greenland og Posta út eina felags frímerkjaútgávu.

Hansara kongaliga hátign, Heindrikur prinsur av Danmark er giftur við Margretu II drotning av Danmark.

Heindrikur prinsur varð borin í heim tann 11. jui 1934 í Talence, Gironde í Fraklandi. Føðinavn hansara er Henri Marie Jean André, greivi de Laborde de Monpezat. Foreldur hansara vóru André de Laborde de Monpezat og kona hansara, Renée de Monpezat (fødd Doursennot).

Fyrstu fimm árini vaks Heindrikur upp í Franska Indokina, núverandi Vietnam, har faðir hansara stóð fyri famijuáhugamálum í ídnaðar- og handilsfyritøkum sum abbi Heindriks hevði stovnað. Í 1939 vendi familjan aftur til Fraklands og búðu næstu 11 árini á ættargarðinum "le Cayrou" í Cahors.

**Útbúgving**

Heindrikur prinsur gekk í skúla heima til 1947, tá hann varð sendur á ein jesuittara kostskúla í Bordeaux. Frá 1948 til 1950 gekk hann á studentaskúla í Cahors. Í 1950 fór hann tó aftur til Vietnam og tók studentsprógv á franska studentaskúlanum í Hanoi í 1952.

Frá 1952 til 1957 las Heindrikur prinsur løgfrøði og samfelagsfrøði við Sorbonne universitetið í París. Samstundis las hann kinesisk og vietnamesisk mál á École Nationale des Languages Orientales. Eftir at hann varð magistari í fronskum bókmentum og eysturlendskum málum, var hann tvey ár í lestrarørindum í Hong Kong og Saigon.

Frá 1959 til 1962 gjørdi Heindrikur prinsur hertænastu í Algeria.

**Diplomatiska yrkisleiðin**

Í 1962 varð Heindrikur prinsur settur í starv í asiatisku deildini í franska uttanríkismálaráðnum. Frá 1963 til 67 starvaðist




Heindrikur prinsur og Margreta drotning á vitjan í Føroyum, 2010
Mynd: Scanpix

hann sum ambassaduskrivari á fronsku sendistovuni í London.

**Prinsur av Danmark**

Í 1964, meðan hann starvaðist á sendistovuni í London, hitti Heindrikur donsku krúnprinsessuna Margretu, sum tá las í Onglandi. Parið varð trúlovað í 1966 og 10. juni 1967 giftust tey í Holmens kirke í Keypmannahavn. Við giftuni fekk hann heitið: Hansara hátign, Heindrikur prinsur av Danmark.

Parið hevur tveir synir, Fríðrik krúnprins (f. 26. mai 1968) og Joachim prins (f. 6. juni 1969).

Í 1972 doyði Fríðrikur kongur og krúnprinsessan varð lýst drotning Margreta 2. av Danmark.

Sum maki til sitandi ríkisstjórnaran, hevur drotningarmaðurin verið ein fullkønur stuðul og hevur røkt sínar almennu skyldur saman við Margretu drotning eins væl og einsamallur. Ongin ivi man vera um at diplomatiska bakgrundin hjá Heindriki prinsi og holli kunnleikin um altjóða viðurskifti, hava havt stóran týdning fyri danska kongshúsið. Nútímans danska kongsveldið hevur rættiliga stóra altjóða helling og hetta man í stóran mun verða Heindriki prinsi at takka.

**Bókmentaligi prinsurin**

Áhugin hjá Heindriki prinsi fyri bókmentum, máli og matkynstri hevur víst seg í fleiri bókaútgávum, bæði av egnum verkum og umsetingum úr fronskum bókmentum. Í 1981 týddi hann saman við drotningini, skaldsøguna "Alle mennesker er dødelige" av Simone de Beauvior – ið varð givin út undir dulnavninum H. M. Vejerbjerg.

Hann hevur eisini givið út fleiri yrkingasøvn, m.o. "Chemin Faisant" (1982), "Cantabile" (2000), "Les escargots de Marie Lanceline" (2003) og "Murmures de vent" (Teskandi lot) (2005). Verkið "Roue-libre" frá 2010 varð týtt til danskt av Margretu drotning og Peter



Hendan snøgga mappan verður givin út saman við frímerkjunum.
Í felagsmappuni er eitt frímerki úr hvørjum landi,
Føroyum, Danmark og Grønlandi.
Bílegg mappuna á bíleggingarseðlinum mitt í blaðnum.
Prísur: 51,00 kr.

Poulsen undir heitinum "Frihjul".

Endurminningarverkið "Destin oblige" (Lagna bindur) kom út í 1996 og í bókini "Chateau de Caix – stedet, vinen og maden" sigur Heindrikur prinsur frá um sítt franska vínslott, um søguna og umhvørvið. Áhugin fyri matkynstri hevur eisini víst seg í tveimum kókibókum, "Ikke altid gåselever" frá 1999, saman við Jakob Johannsen og "Til glæde for ganen – nye opskrifter til et kongeligt køkken" frá 2005.

**Heindrikur prinsur**

Eisini hiðan úr Føroyum vilja vit heiðra Heindrik prins. Sum brøðratjóðir okkara í ríkisfelagsskapinum, Danmark og Grønland, hava vit fingið okkara burturúr hansara leikluti og støðu í kongshúsinum, og virðismeta vit hansara fryntliga lyndi tá drotningarhjúnini vitja.

Til lukku við teimum 80 árunum frá okkum her úti í Norðuratlantshavi!

Anker Eli Petersen




Sjálvklistrandi hefti




Royndarprent

# Postgjaldsmerki 2014: Føroysk frímerki í 40 ár

Í januar 2015 eru 40 ár liðin síðan fyrstu føroysku frímerkini vórðu givin út. Áðrenn hetta vórðu donsk frímerki brúkt í Føroyum. Í hesum sambandi hava vit avgjørt at geva nøkur av klassisku føroysku frímerkjunum útaftur - hesaferð sum postgjaldsmerki.

Felags fyri hesi frímerkini er, at kendi gravørurin Cz. Slania hevur graverað tey. Frímerkini eru givin út í tíðarskeiðnum 1984 - 1995.

Postgjaldsmerkini vísa hesi frímerki:
FR 097 úr útgávuni "Sluppir" tann 10. september 1984. Sluppin á frímerkinum er "Westward Ho" TN 54, bygd í Grimsby í 1884 og varð keypt til Føroya í 1895. Sluppin er umvæld og væl varðveitt og verður í dag nýtt til leigutúrar.

FR 169 úr útgávuni "Kirkjubømúrurin" tann 17. oktober 1988. Múrurin í Kirkjubø er bygdur umleið ár 1300 í gotiskum stíli og er eitt av mætastu fornminnum í Føroyum. Ole Wich hevur lagt útgávuna til rættis.

FR 173 úr útgávuni "Havnar kirkja" tann 6. februar 1989. Frímerkið við Havnar kirkju varð givið út í sambandi við at kirkjan tá gjørdist 200 ár. Tað vil siga, at kirkjan í ár er 225 ár. Ole Wich hevur lagt til rættis.

FR 277 úr útgávuni "Gamlar fólkalívsmyndir" tann 12. september 1995. Frímerkið vísir neytakonur og er gjørt eftir eini fotomynd frá aldamótinum.

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | Postgjaldsmerki 2014:<br>Føroysk frímerki í 40 ár |
| Útgávudagur: | 01.10.2014 |
| Virði: | 4 x 8,00 DKK |
| Tekningar: | Endurgeving av gomlum frímerkjum |
| Stødd: | 22,5 x 55,0 mm |
| Prentháttur: | Flexoprent |
| Prentsmiðja: | Ganket, Danmark |







FO 792-795 Royndarprent

# Fyrri heimsbardagi

**Stríðið mikla**

Fyrst í august 1914 fingu føroyingar ófrættatíðindi um at stórkríggj var brostið á niðri á Evropiska meginlandinum. Upphavið til stríðið var tann sokallaða juli kreppan í kjalarvørrinum av yvirgangsatsóknini í Sarajevo tann 28. juni 1914, tá serbiski tjóðskaparmaðurin Gavrilo Princip skeyt og drap eysturríkska trúnfylgjaran Franz Ferdinand og konu hansara Sophiu.

Eysturríki-Ungarn hevði síðan Balkankríggini í 1912 – 13, stúrt fyri gongdini í teimum fyrrverandi osmannisku hjálondunum á Balkan, har Serbia stóð sum ein alsamt sterkari valds-faktorur. Eysturríki-Ungarn hevði bíðað eftir einari undanførslu at seta Serbia upp á pláss – og við morðinum á trúnarvingin, beyðst høvið teir høvdu bíðað eftir. Ófrávíkilig krøv vóru sett til Serbiu, nakað ið landið sjálvandi ikki kundi góðtaka, og avleiðingin varð at Eysturríki-Ungarn tann 27. juli 1914 lýsti krígsstøðu mótvegis tí ungu tjóðini.

Eysturríki-Ungarska stjórnin visti fullvæl at støðan kundi føra til stórkríggj. Russland hevði váttað at tryggja Serbisku trygdina og tí hevði Eysturríki-Ungarn tryggjað sær stuðul frá Týsklandi. Dagin eftir at kríggj var brostið á, fór Russland undir at búgva út herlið og tað førdi við sær at Týskland tann 1. august bjóðaði Russlandi av í kríggj.

Av ótta fyri ótespiligu gongdini í grannalondunum fór Frakland eisini undir at kalla inn hermenn til stríð, og hetta fekk Týskland at bjóða Fraklandi av í kríggj longu 3. august. Sama dag gjørdi Týskland innrás í Belgiu, fyri tann vegin at kunna leypa á Frakland, og hetta førdi til at Ongland umgangandi lýsti krígsstøðu mótvegis Týsklandi.

Sostatt var stórkríggj ein veruleiki í Evropa – og her úti í Norðuratlantshavi kundu føroyingar bara við vaksandi bilsni eygleiða, hvussu hesin ógvusligi leikur breiddi seg og tað lagnutungu gongdina, sum komandi árini skuldi føra so miklan skaða og neyð við sær.

**Avleiðingar**

Tað vardi ikki leingi fyrr enn føroyingar kendu avleiðingarnar av mikla krígnum. Sigling til



og frá meginlandinum, serliga Danmark, steðgaði mest sum upp. Stríðandi londini framdu blokadur, herjaði á høvunum og fóru eftir skipum ið kundi hugsast at flyta neyðsynjarvørur til fíggindaland.

Hetta førdi við sær at trot varð á teimum mest neyðturviligu vørunum. Brátt kundi breyð og sukur bert keypast við rationerings-korti - og kaffi og te gjørdist alt tvørligari og dýrari at fáa til høldar. Men í neyðini fær hugflogið veingir og fólk royndu seg fram til ymsar hættir at drýggja tað sindrið tey høvdu. Søgurnar siga til dømis frá kvinnum ið kókaðu rogn og blandaðu tað upp í rug-mjølið, fyri at fáa tað at strekkja longur.

Fyrstu krígsárini skortaði so mikið í, serliga hjá fátæka partinum av fólkinum, at talan varð um veruliga kreppustøðu. Um veturin var lítið av fiski at fáa og várróðurin í 1915 varð tarnaður av liggjandi óveðri. Trotsjúka tók seg upp orsakað av vantandi ella ov einstáttaðari føði og kravdi enntá mannalív millum tey veikastu, børn og eldri fólk.

Oljugoymslurnar í landinum vóru brátt uppi og olja kom ikki longur til landið. Fólk royndu seg tí við lýsi, ið vísti seg at virka væl í lamp-um og enntá sum brennievni til bátamotorar.

**Lagnudagurin**

Tann 1. februar 1917 ásetti týska sjóverjan eitt sokallað krígsøki í havinum kring Stóra-bretland. Eitthvørt skip inni á økinum, kundi til eina og hvørja tíð væntað at verða álopið av týskum kavbátum. Til alla vanlukku fyri Føroyar, rakk økið langt inn á landgrunnin, heilt upp til Suðuroynna og umfataði sostatt eisini Føroya banka - ríkastu fiskileið vit áttu.

Krígsøkið var serliga ætlað at raka bretsk áhugamál, farmaskipasigling og skipafylgi ið sigldu farm til Onglands. Føroyingar vónaðu at hóttanin ikki galt føroysk fiskifør og hildu, hóast vandan, áfram at fiska í økinum.

Men morgunin tann 23. mai 1917 rakti kríggið føroyskar fiskimenn í ólukkumát. Aksel Sivertsen, skipari á sluppini Elsu, sigur í Norðlýsinum frá at teir árla á morgni tann

Kortið vísir krígsøkið í havinum kring Stórabretland, ið týska sjóverjan ásetti 1. februar 1917




23. vórðu steðgaðir av einum týskum kavbáti, ið skeyt við maskinbyrsu framman og aftanfyri skipið. Manningin tók skundisliga proviant við sær í bjargingarbátin og fór av Elsu. Teir róðu yvir til kavbátin, ið gav boð um at seks teirra skuldu koma upp á dekkið, teirra millum skipari og bestimaður. Tveir av kavbátamanningini fóru so umborð á bátin og fingu føroyingarnar at rógva yvir aftur til Elsu. Við sær høvdu teir brennievni – og brátt sá manningin á Elsu skipið standa í ljósum loga. Týska kavbátamanningin var illa við av støðuni, men har var onki at gera. Teir gjørdu eftir boðum, søgdu teir.

Manningin á Elsu fór so undir at rógva til lands. Tá teir høvdu róð einar fýra tímar, komu teir fram á sluppina Orion. (Sluppin hevði um hetta mundið skift navn til Beinir, men Aksel Sivertsen brúkar gamla navnið). Tá skiparin á Orion hoyrdi hvat var hent, gav hann boð um at kvetta snørini og seta segl. Teir høvdu tó ikki siglt leingi fyrr enn kavbáturin tók teir aftur og Orion fekk somu viðferð sum Elsa. Manningarnar báðar róðu síðan í felag til lands. Ávegis sóu teir tvær aðrar sluppir og ein trolara – men eisini kavbátin, ið nú stevndi móti trolaranum. Teir róðu alla náttina og fyrrapartin og komu til Skopunar klokkan seks kvøldið eftir.

Tað skuldi vísa seg at átta føroysk fiskifør vóru søkt tann 23. og 24 mai. Til alla Guds lukku sluppu allar manningarnar frá atsóknini við lívinum.

Øll skipini vóru søkt av sama kavbáti, UC 33, førdur av kaptein-loytnantinum Martin Schelle. Samanlagt søkti UC 33 36 skip undir krígnum, men varð sjálvur søktur av einum enskum patruljubáti í St. George's Channel tann 26, september 1917. Bert ein av teimum 27 monnunum umborð varð bjargaður.

**Hermaðurin**

Meðan føroyingar flestir upplivdu fyrra heimsbardaga bur-



UC 33



DUPLICATE

ATTESTATION PAPER.

No. 722 191

Folio.

CANADIAN OVER-SEAS EXPEDITIONARY FORCE.

QUESTIONS TO BE PUT BEFORE ATTESTATION.

(ANSWERS)

1. What is your surname? Pjeturson
1a. What are your Christian names? Christian Ludwig
1b. What is your present address? Oak View Po. Manitoba
2. In what Town, Township or Parish, and in what Country were you born? Kvivig Farow Island. Iceland
3. What is the name of your next-of-kin? Pjetur Hans Pjeturson
4. What is the address of your next-of-kin? Kvivig Karivik Farow Island. Iceland
4a. What is the relationship of your next-of-kin? Father
5. What is the date of your birth? Feb 6th, 1890.
6. What is your Trade or Calling? Carpenter
7. Are you married? No
8. Are you willing to be vaccinated or re-vaccinated and inoculated? Yes
9. Do you now belong to the Active Militia? No
10. Have you ever served in any Military Force? No
11. Do you understand the nature and terms of your engagement? Yes
12. Are you willing to be attested to serve in the Canadian Over-Seas Expeditionary Force? Yes

108TH BN

Innkallingarboðini, sum Christian Petersen fekk til 108. battaljón.



turfrá, vóru aðrir ikki líka hepnir. Ein av teimum var tann 26 ára gamli Christian Ludwig Petersen úr Kvívík, sum fyri kríggið flutti til Kanada.

Í mars 1916 varð Christian Petersen innkallaður til nýggju 108. battaljónina (Selkirk-Manitoba) í The Canadian Expeditionary Force (CEF), ið stríddist á evropiskum vígvøllum. Longu 18. september sama ár, varð battaljónin send til Onglands, har hon varð upptikin í 14. tiltaksbattaljónina, ið sendi tiltakshermenn til stríðseindirnar á meginlandinum.

Christian Petersen varð sendur til 16th Battalion (Canadian-Scottish), sum um tað mundið lá í Arras økinum í Fraklandi. Hetta var meðan ógvusliga stríðið um Vimy Ridge stóð á í 1917. Kanadisku battaljónirnar høvdu brúk fyri nýggjum fólki – í stríðnum um Vimy-Ridge t.d. misti 16. battaljón annan hvønn hermann.

Ungi føroyingurin kom úr øskuni í eldin. 16. battaljón luttók í bardøgum um Hill 70, Ypres og Passchendaele. Í 1918 luttóku teir í sonevnda "100 Days Offensive" frá 8. august til krígslok tann 11. november: Bardagarnir við Amiens, onnur orrustan um Arras, Scarpe og Drocourt-Quéant linjuna, og víðari til bardagarnar um Hindenburg linjuna og Canal du Nord - líka til seinasta álopið á Mons.

Sum herdeildir flest í Fyrra heimsbardaga, hevði 16. battaljón stórt mannfall, og teir ið sluppu við lívinum noyddust at liva við tí strongd og sálarløstum, ið standast av stríðsminnum. Christian Petersen var onki undantak. Tá hernaðarskyldan var av og hann varð heimsendur úr Evropa, flutti hann aftur til Føroya og gjørdist bóndi í Kaldbak. Sambært fólki ið kendu hann, orkaði hann ikki at tosa um kríggið ella sín leiklut í tí – minnini vóru rætt og slætt ov ræðulig.

Anker Eli Petersen







FO 796 Royndarprent

# Casement frágreiðingin 1904 – Daniel J. Danielsen (Dollin)

Andlit á gulnaðum myndum. Minni og søgubrot um fólk ið livdu og virkaðu fá ættarlið síðan. Litfarnar slóðir eftir lívslagnum ið fána burtur í miskunnarleysum tíðarmeldri.

Men viðhvørt hendir tað at røtt eygu falla á rætta slóð. Tráðurin verður uppafturtikin og søgur, nógv størri enn heimlig minni benda á, rulla seg út.

Soleiðis vildi til tá søgufróði fyrrverandi Fiskimannafelagsformaðurin og politikarin, Óli Jacobsen, av Sosialinum varð biðin um at skriva um fólk ið liggja grivin í Gamla Kirkjugarði í Havn. Hetta førdi til eina røð av áhugaverdum greinum undir felagsheitinum "Hendur ið sleptu".

Tann mest undrunarverda søgan kom av einum gravsteini við áskriftini:
*D. J. Danielsen, Missionerur. F. 25. juni 1871 – D. 16. oktober 1916. Virkaði í Kongo 1901-1903. Ein óræddur hermaður Harrans.*

**Dollin**
Daniel Jacob Danielsen, vanliga róptur Dollin, var mest kendur fyri sítt virki sum prædikumaður og trúboðari í Føroyum beint eftir fyrra aldamótið. Hann var ein av undangongumonnunum í føroysku Brøðrasamkomuni, sum í dag er størsta fríkirkja í Føroyum. Hann ferðaðist kring oyggjarnar og helt vekingarfundir og var yvirhøvur ein umstríddur persónur í samtíðini, kendur fyri framfýsni og snarsinni. Í minningarorðunum um Dollan skrivar Dimmalætting m.a.: *"i en første tid optrådte han meget kraftigt, men i de seneste år var han mere afdæmpet. Man havde fuldt ud indtryk af, at han var en helstøbt kristen karakter."*

Starvið sum missionerur í Føroyum gav D. J. Danielsen bæði vinir og óvinir, sum rímiligt er í rembingartíðum, og tiltikna snarsinnið var honum til lítla hjálp.

Men tað var ikki innan bøgarðarnar at Danielsen setti sínar týdningarmestu slóðir. Sum teksturin á gravsteininum bendir á, vistu føroyingar at hann eitt skifti virkaði sum trúboðari í Kongo – tó uttan at festa seg nakað serligt við tað. Men tá Óli Jacobsen kannaði



Hjóldamparin "Pioneer"

hetta tíðarskeið í lívi Danielsens, kom ein sera undrunarverd søga undan kavi, ið lýsir leiklut hansara í hendingum ið broyttu heimssøguna.

**Frístaturin Kongo**

Sum avleiðing av at evropiskir rannsóknarmenn í 19. øld høvdu sett Afrika út í kortið, byrjaði ein umfatandi kolonisering av teimum risastóru landaøkjunum inni í heimspartinum. Frá 1885 til 1908 hevði belgiski kongurin Leopold II persónligt ræði yvir Frístatinum Kongo, ið norðantil hevði mark eftir Tsjiloango ánni til táverandi portugisiska innlendisøkið Kabina og Franskt Kongo. Eystureftir lá markið við Bretskt- og Týskt Eysturafrika og suðureftir móti Bretska Sentralafrika og Portugisiska Vesturafrika. Hetta risastóra landaøkið, 2.252.800 fermetrar stórt, var ein rein handilskoloni, ið Leopold kongur hevði ræði yvir. Útflutningsvørurnar úr Frístatinum Kongo umfataði m. a. fílabein, palmuolju, kaffi og eina umfatandi gummiframleiðslu. Arbeiðið var framt við tvungnari arbeiðsmegi úr kongolskum fólkabólkum, sum fingu lítið og onki burturúr virðismikla útflutninginum.

**Trúboðaravirksemi**

Trúgvi fylgisneytin hjá hjálandatøkuni var kristið trúboðaravirksemi - og Frístaturin Kongo var onki undantak. Umfatandi trúboðaravirksemi á yvir 100 trúboðanarstøðum, harav bróðurparturin varð rikin av protestantiskum felagsskapum, tók seg skjótt upp í landinum. Tað var til eina av hesum støðunum, ensku Balolo trúboðarastøðina í Bonginda, at D. J. Danielsen kom í 1901, fyri at virka sum trúboðari og skipari/maskinmeistari á lítla hjóldamparanum "Pioneer" (ovari áarbáturin á frímerkinum).

D. J. Danielsen, sum á ungum árum ikki hevði nakað serligt átrúnaðarligt tilknýti, var ein heldur ótálmaður unglingi. 18 ára gamal fór hann til Skotlands at nema sær útbúgving sum maskinmeistari. Í nøkur ár sigldi hann við enskum eymskipum og hevði, eftir hvat sigst, trupulleikar av rúsdrekka. 27 ára gamal varð hann tó umvendur á einum kristnum fundi í Glasgow, vendi gamla lívinum bakið og varð

síðan, sum longu nevnt, førdur til Kongo av síni kristnu sannføring.

### Ágangur mótvegis fólkinum

Longu í 1890unum gingu leysasøgur um ágang mótvegis innfødda fólkinum í Frístatinum Kongo. Trúboðarar, blaðfólk og mannarættindarfelagskapurin, Aboriginal Protection Society, søgdu frá umfatandi brotum á mannarættindi í landinum, men tíðindini vóru kveistraði til viks av Leopold kongi og hansara kongolesisku umsiting.

### Casement frágreiðingin

Í 1903 vóru søgurnar um ágangin mótvegis innfødda fólkinum so umfatandi, at enska parlamentið avgjørdi at senda bretska konsulin í Boma, Kongo – íran Roger Casement – niðan á Kongoánna at kanna støðuna.

Fyri at kunna ferðast uttan at myndugleikarnir vaktu yvir honum, leigaði Roger Casement gamla hjóldamparan "Henry Reed" frá amerikansku babtista missiónini (niðari báturin á frímerkinum). Congo Balolo Mission sendi honum ein skipara/maskinmeistara – og hetta var eingin annar enn D. J. Danielsen.

Danielsen førdi Casement umborð á "Henry Reed" runt um á Kongoánni og inn á tvøráirnar. Hann virkaði afturat starvinum sum skipari og maskinmeistari, eisini sum hjálparmaður og tulkur hjá Casement. Í einum brævi til bretska uttanríkismáláráðið, rósti Casement Danielsen fyri dugnaskap og gjørdi vart við at um hann ikki hevði verið við á ferðini, hevði túrurin ikki verið so væleydnaður sum hann gjørdist.

Úrslitið av rannsóknarferðini varð tann sonevnda "Casement frágreiðingin", sum í 1904 kom út við sundurlemjandi atfinningum mótvegis Kongo umsitingini hjá Leopold kongi. Frágreiðingin umfataði ræðuligar frásagnir um tvingsil, morð, limaløstan, burturflyting og karráan harðskap mótvegis innfødda fólkinum, framt av hermonnum hjá umsitingini.

Við støði í frágreiðingini, kravdi bretska stjórnin eina endurskoðan av Berlinavtaluni frá 1885, har Leopold kongur hevði fingið persónligan ræðisrætt til hjálandið. Belgiska parlamentið noyddi Leopold at seta ein óheftan kanningarbólk, ið stórt sæð kundi vátta ákærurnar hjá Roger Casement.

### Arvurin eftir Danielsen

Eftir rannsóknarferðina hjá Casement, fór D. J. Danielsen aftur til Onglands, har hann íðin royndi at fáa sín egna trúðboðarafelagsskap, Congo Balolo Mission, til alment at finnast at støðuni í Kongo.

Av tí at felagsskapurin dráladi, fór Danielsen sjálvur undir at halda eina røð av fundum í Skotlandi, har hann vísti ljósmyndir av løstaðum kongolesum, hann sjálvur hevði tikið. Í hesum sambandi hevði hann neyvt samband við blaðmannin E. D. Morel, ein av høvuðsleikarunum í somu søk.

Ljósmyndafundirnir hjá D. J. Danielsen fingu so framúr undirtøku, at Balolo missiónin stutt eftir fór undir at skipa fyri egnum fundum, sum í mars 1904, eftir at Casement frágreiðingin var útkomin, førdi til stovnanina av Congo Reform Association, ið síðan koyrdi átakið víðari og vakti eina sanna fólkarørslu í Stórabretlandi, Europa og USA. Kendir menn sum Sir Arthur Conan Doyle og Mark Twain luttóku eisini í átakinum.



Hendan rørslan var orsøkin til at Leopold II í 1908 noyddist at siga Kongo frá sær sum




Robert Casement.



Blaðmaðurin, E.D. Morel við skrivborð sítt.

persónliga ogn.

Kanningarnar hjá Óla Jacobsen hava víst at tað var D. J. Danielsen ið tók upprunaligu og vælkendu myndirnar av løstaðum kongolesarum, men at onnur hava fingið heiðurin fyri hetta. Hesar myndir høvdu avgerandi týdning fyri úrslitið av átakinum.

Tað er eisini greitt at tað var Danielsen ið kveikti upp undir tað, ið seinni varð til sokallaðu "Congo Reform Campaign", og at enda fekk avleiðingar fyri Leopold kong. Men leikluturin hjá honum er gloymdur og hann verður bert nevndur kvamsvís í søgunum.

D. J. Danielsen vendi ongantíð aftur til Kongo. Í 1904 flutti hann heim til Føroya við konuni Linu, ið hann giftist við sama ár – og byrjaði sítt trúboðaravirksemi á klettunum. Hetta helt hann fram við til hann doyði í 1916 og varð, sum nevnt í innganginum, ein av undangongumonnunum í føroysku Brøðrasamkomuni.

Í sambandi við frímerkjaútgávuna gevur Óli Jacobsen eina bók út um Daniel Jacob Danielsen á enskum, har hansara leiklutur í Kongomálinum verður dokumenteraður við higartil ókendum skjølum.

Anker Eli Petersen

*GG! Enska bókin um Dollan kann keypast hjá okkum. Nýt bíleggingarseðilin mitt í blaðnum.*









FO 797 Royndarprent

# 70 ár síðan D-dagin

6. juni í ár eru 70 ár liðin síðan D-dagin. Dagurin tá Operation Overlord, innrásin hjá teimum sameindu, varð sett í verk. Upp á fáar tímar, náttina til og um morgunin tann 6. juni 1944, framdu tey sameindu londini eitt ógvusligt álop á strendurnar í Seine-víkini millum Cherbourg og Le Havre. Endamálið var at vinna eitt fótafesti á evropiska meginlandinum, har teir kundu flyta hermenn og ovurstórar mongdir av krígstilfari, ið skuldi brúkast í bardøgunum um Vestureuropa.

Innrásin í Normandínum er tann størsta og mest umfatandi hernaðarliga verkætlan, ið nakrantíð er sett í verk. Hon kravdi sera neyva planlegging og ovurstórar logistiskar máttir, har hvørt hjól, stórt sum smátt, skuldi virka saman.

Fleiri føroyingar luttóku í hesum torskilda og vandamikla vásanum. Vit hava til hesa frímerkjaútgávuna valt at lýsa tann mest enigmatiska av teimum, kapteynin Vilhelm Reinert-Joensen (1891-1949) – og fyri at gera tað, mugu vit byrja eina heilt aðrastaðni.

**Captain Joensen**

Tann 28. januar 1941 stevndi tað yvir 200 metrar langa og 22.225 tons tunga hernaðarflutningsskipið "Edmund B. Alexander" í kolandi stormi inn gjøgnum "The Narrows" í innsiglingini til St. John's í New Foundlandi. Skipið var so stórt og stakk so djúpt at munurin millum kjøl og botn var undir ein metur. Fólk vóru komin úr øllum ættum at síggja grálitta risaskipið, tað største ið nakrantíð hevði lagt at bryggju í St John's. Umborð vóru vóru uml. 1.000 hermenn, ið skuldu manna fyrstu amerikansku "Land & Lease" hernaðarstøðina uttanfyri USA, hóast landið enn ikki var komið upp í 2. heimsbardaga.

Edmund B. Alexander varð liggjandi í St. John's til tann 20. juni og virkaði sum flótandi barakk hjá hermonnunum meðan støðin varð bygd á landi.

Skipsførari var føroyingurin Vilhelm R. Joensen úr Havn, ella sum flestu amerikansku keldur nevna hann, Capt. William Joensen, frá Army Transport Service (ATS).

**Hildu hann var deyður**

Hans Christoffer Vilhelm Reinert-Joensen varð borin í heim í Godthaab tann 17. mars 1891, har faðir hansara, Johan Carl Joensen, vanliga róptur Grønlands Johan, var kolonistjóri. Í 1902 flutti familjan aftur til Føroya og búsettist í Havn.



Longu 14 ára gamal fór Vilhelm til skips. Í 1907, sama ár sum pápi hansara doyði, fór hann við danska skúlaskipinum Viking á ferð kring heimin og tá tað í 1910 kom heim aftur, fór hann á navigatørskúla í Danmark. Eftir lokna útbúgving fór Vilhelm aftur út at sigla. Samskiftið við tey har heima gjørdist alsamt trekari og tá fyrri heimsbardagi var av, steðgaði tað heilt. Tað komu ikki fleiri brøv frá honum, og familjan gekk eftirhondini út frá, at hann var deyður onkustaðni úti í heimi.

**Amerikanskur statsborgari**

Men Vilhelm var á lívi. Hann sigldi við farmaskipum kring knøttin. Í 1928 gjørdist hann amerikanskur statsborgari og fekk stutt eftir tað, starv sum stýrimaður hjá ATS (Army Transport Service). Sum fráleið gjørdist hann kapteynur – og í 1941 stóð hann so sum skipsførari á brúnni á einum tí størsta hernaðarflutningsskipinum nakrantíð.

**Ísland**

Í 1941 yvirtók USA hersetingina av Íslandi frá bretum, ið tørvaðu hermannaliðini aðrastaðni.

Eitt átak av tí støddini leggur nógv fyri á flutningsøkinum, og illa útgjørda havnarlagið í Reykjavík gjørdist brátt ein logistisk marra fyri amerikanarar. Hernaðarvaldið setti tí majorin, seinni oberstin, Richard S Whitcomb at loysa flutningstrupulleikarnar. Hann savnaði eitt lið av serfrøðingum og fekk sett skil á ruðuleikan. Ein av hesum var Captain Vilhelm R. Joensen fra US Transportation Corps.

Tað frættist skjótt í Føroyum, at ein av høgu amerikansku yvirmonnunum í Reykjavík var føroyingur. Fleiri føroyskir sjómenn høvdu hitt tann veðurbarda kapteynin, ið vísti seg at vera ein fryntligur maður í fimmtiárunum – og tað vardi ikki leingi fyrr enn fólk komu fram á at hetta var Villi hjá Grønlands Johan, ið hevði verið burtur so leingi.

**"Vís mær oyrað!"**

Várið 1943 kom ein amerikanskur oyðari inn á Havnarvág og setti Vilhelm Joensen av. Hann fekk skjótt samband við familjuna, men tá hann fyri fyrstu ferð í yvir 30 ár stóð frammanfyri mammu síni, kendist hon ikki við hann. Amalia var ein heldur bersøgin kvinna og kravdi at offiserurin, ið stóð fyri henni,



Greenville Victory, eitt av skipunum,sum Vilhelm Reinert-Joensen førdi.



skuldi taka kasjettina av og vísa sær oyrað. Sum smádrongur hevði Vilhelm meiðsla annað oyrað og ikki fyrr enn Amalia sá arrið, varð hon sannførd um at hetta veruliga var hennara Villi.

**Omaha Beach**

Heystið 1943 varð minkað um virksemið á flutningsøkinum í Reykjavík. Flestu yvirmenn og hermenn hjá Transportation Corps vóru fluttir til Onglands har teir skuldu fyrireika seg til innrásina í Normandínum. Teir yvirtóku flutningseindina "11th Port", ið skuldi virka á tí seinni so illkenda strandarøkinum Omaha Beach. Tað er eitt sindur ógreitt, hvat Vilhelm Joensen tókst við hesar mánaðirnar, men í hernaðarskjølum sæst at hann javnan kemur og fer á høvuðsstøðini ETOUSA Assault Training Centre, har ætlanir vórðu lagdar viðvíkjandi innrásini.

Ein av fyrstu døgunum eftir innrásina vitjaði Vilhelm stýrimannin Martin í Kvidni úr Sumba, sum lá við danska farmaskipinum Grenaa, á Omaha Beach. Vilhelm var í fullum yvirmannabúna og Martin segði seinni frá, at hann umsat leiðsluna av sleipibátunum á staðnum.

**Aftur á teimum stóru skipunum**

Við og eftir krígslok vendi Vilhelm Reinert-Joensen aftur til upprunastarvið sum skipsførari á teimum størstu hermannaflutningsskipunum. Frá 1946 til 1949 førdi hann skip sum George W. Goethals, George Washington, General M. L. Hersey og Greenville Victory, og flutti amerikanskar hermenn í túsundatali heim úr Evropa og týskar krígsfangar aftur til Týsklands.

Captain Joensen var eitt kent andlit í Brooklyn, New York, har flotastøðin hjá amerikanska herinum lá. Hann kom javnan fyri á "society" síðum í dagbløðunum sum tann veðurbardi og fryntligi skiparin, ið einans hevði heima á opnum havi.

Villi hjá Grønlands Johan gjørdist tó ikki gamal maður. Í august 1949 varð hann funnin deyður á hotellrúmi sínum í Brooklyn, 58 ára gamal.

*Í samband við sjálva frímerkjaútgávuna í september, kemur ein longri og meira umfatandi lýsing av lívinum hjá Vilhelm R. Joensen.*

Anker Eli Petersen







FO 798-799 Royndarprent

# Gleði og friður í stríði og líðing

**"Óttist ikki! Eg kunngeri tykkum stóra gleði, ið skal verða fyri alt fólkið." Luk.ev. 2.10**

Hesin óvæntaði boðskapur órógvaði hirðarnar mitt á nátt. Nú sum fyrr røktu teir sítt arbeiði á nátt sum á degi, seyðurin lá sum vant tryggur, onki óvanligt sást fyri framman, arbeiðsgongdin var hin sama, sum hon altíð hevði verið. Teir bíðaðu bara eftir, at sólin skuldi rísa, og teir enn eina ferð kundu leiða tað svanga fylgið á nýggj beiti. Soleiðis høvdu hirðar og seyður bíðað í øldir hvørja einastu nátt.

Lívið hjá hirðunum eins og hjá djórunum fylgdi neyvt ringrásini í náttúruni. Teir livdu í samljóði við náttúruna og djórini. At víkja frá hesi ringrás var hin vissi deyði. Arbeiðið var krevjandi, tí vandar lúrdu, ódjór og ránsmenn kundu leypa á og órógva ringrásina – teirra uppgáva var at dyrka og varða um beitini og seyðafylgið. Hetta hevði verið ábyrgdin líka síðan Ádam og Eva fingu sum uppgávu at dyrka og varðveita urtagarðin Eden, t.v.s. samljóðið í tilveruni. Soleiðis hevði altíð verið, og soleiðis mundi altíð fara at vera.

Mundi tilveran ikki bara vera ein endaleys og órættvís ringrás, har nøkur vóru ovurrík, meðan onnur vóru blóðfátøk, har nøkur doyðu í hungri, meðan onnur livdu sítt sorgleysa lív?

**Nei! Hirðarnir vistu, hvør teirra uppgáva var í náttúrligu ringrásini – at verja um hana, at liva í henni og at taka ábyrgd av at útvega sær og sínum mat í munnin.**

Kanska vísmaðurin Sálomon kortini hevði rætt, tá hann segði: "Tað, ið verið hevur, er tað, ið verða skal, og tað, ið hent hevur, er tað, ið henda skal, og einki nýtt er undir sólini." Hann segði jú eisini: "Alt er fáfongd, tómt og meiningsleyst"! Præd. 1.1-9



Hirðarnir væntaðu ivaleyst onga fundamentala broyting í náttúrligu ringrásini.

Tí hvukku teir við, tá teir nú brádliga hoyrdu eina óvæntaða rødd boða ein heilt nýggjan, ókendan boðskap, sum teir høvdu ilt við at trúgva. Kundi nøkur gleði vera so stór, at hon fevndi um øll uttan mannamun? Ein gleði, sum ikki gloymdi nakran? Ein friður, sum øll kundu njóta? Um so var, kundi tað ikki vera ein tíðarbundin gleði ella ein avmarkaður friður.

Eins og á báðum teimum fyrru frímerkjunum í jólarøðini eydnast tað Edwardi Fuglø avbera væl at mynda í smálutum samskiftið millum ævinleikan og tíðina. Framvegis sæst tann súmbolska stjørnan í erva umboðandi ein transcendentan veruleika, Guds ljós og leiðslu mitt í meiningsloysi, órættvísi og nyttuleysum stríði - eitt ljós frá Skaparanum, sum lýsir okkum vegin at ganga, og sum upplýsir sinnið um tey absoluttu, ævigu virðini mitt í relativitetinum og tí dagliga sjagginum. Frá stjørnuljósinum koma einglarnir, og hagar upp hyggja hirðarnir. Soleiðis eru einglarnir súmbolska ímyndin av tí kosmiska samskiftinum millum Skaparan og menniskju – eitt samskifti í bøn og meditasjón á kosmisku alnótini, sum menniskju ikki kunnu vera fyri uttan, um vit skulu liva í samljóði við Skaparan og boðskapin um **"stóra gleði, ið skal verða fyri alt fólkið."**

Jú, hirðarnir høvdu ta neyðugu gudstilvitanina, sum kravdist í náttúrunnar ringrás at hoyra boðskapin frá Skaparanum. Sjálv náttúran hevði altíð mint teir á tann skapandi máttin í øllum lutum, og eisini hevði lívið í endaleysu ringrásini vakt ein djúpan longsil eftir tíðarleysum virðum. Lívið sjálvt hevði stimbrað kensluna av, at dagliga lívsuppgávan at varða um fylgið, graslendið og familjuna var eitt lið í einum hægri endamáli. Nú fingu ikki

bara teir, hirðarnir sjálvir, lut í stóru gleðini og friðinum, men øll mannaættin kundi nú verða bjargað úr meiningsloysi, órættvísi og líðing.
Tí hyggja hirðarnir uppeftir við opnum sinni; tí hevur annar teirra longu reist seg; tí hava báðir tikið stav í hond til reiðar at bera øðrum tey nýggju tíðindini um gleði og frið. Teir hava sæð Guds vernd og kærleika í útrættu veingjum og ørmum einglanna, teir hava hoyrt gleðina í boðskapinum gjøgnum lúðraljóð og lovsang, og teir hava upplivað Guds tign og myndugleika í lýsandi prýðisbúna einglanna, sum nú av sonnum sýndu teimum sjálvan týdningin í orðinum "eingil", av grikska orðinum "angelos", sum merkir sendiboð - nú eisini millum Skaparan og menniskjað. Hóast hirðarnir fyrst og fremst hugsa um tað jótrandi fylgið, varnast teir í nátt nakað meir. Teir hyggja upp, tí teir hoyra ein púra óvæntaðan boðskap: **"Tykkum er í dag Frelsari føddur, sum er Kristus, Harrin, í staði Dávids. Og hetta skulu tit hava til tekin: Tit skulu finna barn, sveipað, liggjandi í krubbu... Dýrd veri Gudi á hæddini, friður á jørðini, í menniskjum góður tokki!" Luk.ev. 2.11-14**

Hvat hevði eitt barn í eini krubbu at týða? Hvat var loyndarmálið í boðskapinum? Læknin Lukas sigur okkum, at hirðarnir fóru til Betlehems at kanna málið. Har sóu teir, at sjálvur Skaparin hevði tikið stigið at liva saman við líðandi og veika menniskjanum fyri at taka á seg lagnu okkara og geva okkum lut í ævigari gleði og friði, at geva hvørjum einstøkum menniskja lívsinnihald og vón mitt í dagligu, truplu ringrásini.

**"Hirðarnir fóru so avstað aftur, prísandi og lovandi Gudi fyri alt tað, ið teir høvdu hoyrt og sæð."** Teir fóru aftur inn í lívsins ringrás, men nú við gleði, undran, lovsangi og nýggjum lívstreysti.

**Lívsins ringrás varð brotin eina løtu, júst fyri at teir og vit kundu læra at liva í henni við meining, innihaldi og endamáli. Teir høvdu fingið lut í gleðini og friðinum, sum kundi broyta meiningsloysi til meining, tómleika til innihald, ótta til dirvi, vónloysi til vón, ófrið til frið og sorg til gleði.**

Róland í Skorini



# Nýggjar frímerkjaútgávur - 11. juni og 24. september 2014

Royndarprent




* er eisini givið út í sjálvklistrandi hefti við fýra frímerkjum

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Heindrikur prinsur 80 ár*** |
| Útgávudagur: | 11.06.2014 |
| Virði: | 14,50 DKK |
| Nummur: | FO 791 |
| Frímerkjastødd: | 51 x 43 mm |
| Mynd: | Torben Eskerod |
| Design: | Post Danmark Frimærker/Jakob Monefeldt |
| Prentháttur: | Offsett |
| Prentsmiðja: | Posten Frimärken, Svøríki |
| Postgjaldsbólkur: | Smábrøv til Evropa, 0-50 gr. |

Royndarprent




| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Fyrri heimsbardagi** |
| Útgávudagur: | 24.09.2014 |
| Virði: | 4 x 8,00 DKK |
| Nummur: | FO 792-795 |
| Smáark, stødd: | 70 x 100 mm |
| Frímerkjastødd: | 42,00 x 23,52 mm |
| Design: | Anker Eli Petersen |
| Prentháttur: | Offsett |
| Prentsmiðja: | Cartor Security Printing, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Smábrøv í Føroyum, 0-50 g |

Royndarprent




| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Dollin** |
| Útgávudagur: | 24.09.2014 |
| Virði: | 25,00 DKK |
| Nummur: | FO 796 |
| Frímerkjastødd: | 42,00 x 23,52 mm |
| Design: | Anker Eli Petersen |
| Prentháttur: | Offsett |
| Prentsmiðja: | Cartor Security Printing, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Stórbrøv í Føroyum, 101-250 g |

Royndarprent




| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **70 ár síðan D-dagin** |
| Útgávudagur: | 24.09.2014 |
| Virði: | 26,00 DKK |
| Nummur: | FO 797 |
| Frímerkjastødd: | 42,00 x 23,52 mm |
| Design: | Anker Eli Petersen |
| Prentháttur: | Offsett |
| Prentsmiðja: | Cartor Security Printing, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Miðal B-brøv til onnur lond, 51-100 g |

Royndarprent




* hesi frímerki eru eisini givin út í hefti við átta frímerkjum

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Jólaevangeliið 2*** |
| Útgávudagur: | 24.09.2014 |
| Virði: | 26,00 DKK |
| Nummur: | FO 798-799 |
| Frímerkjastødd: | 25,5 x 42,0 mm |
| Tekningar: | Edward Fuglø |
| Prentháttur: | Offsett |
| Prentsmiðja: | LM-Group, Kanada |
| Postgjaldsbólkur: | Smábrøv í Føroyum og til Evropa, 0-50 g |

Framsíðumynd: Havnin - Myndatøka: Kasper Solberg
Snið og uppsetan: Posta Stamps - Prentsmiðja: TrykTeam, Danmark

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn
Føroyar

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo

Find us on Facebook